# ROKKA Á VÁGSBØI

Summarfestivalurin bjóðar í ár til rokk av besta slagið, tá ið D-A-D trína á pall á Vágsbøi. Hetta er fyrstu ferð síðani The Scorpions, at Summarfestivalurin hevur lagt seg eftir rokkstílinum.

– Hettar er nakað, sum mong hava eftirlýst, tí skráin kanska hevur verið í bleytara endanum tey seinastu árini, sigur Erik Biskopstø, fyrireikari av Summarfestivalinum.

## Kunnu ikki bjóða heimsnøvn á hvørjum árið

Í fjør fingu vit Westlife, sum má sigast at verða ein bólkur í heimsklassa. Men tað er trupult, at fáa heimskend nøvn til Føroya hvørt ár.

– Tað er ringt, at finna eitt navn sum Westlife hvørt ár, men vit stremba hvørt ár eftir at geva gestunum hjá okkum eina góða og fjølbroytta skrá, sigur Erik Biskopstø.

Summarfestivalurin hevur higartil bert almannakunngjørt eitt útlendsk navn, men fleiri kunngerðir eru ávegis.

– Vit fara í næstum at kunngera nøkur góð føroysk nøvn, og vit satsa uppá at hava næsta útlendska navnið klárt um ein mánað ella so, sigur Erik Biskopstø.

## Legendur í føroyskum tónleiki

Summarfestivalurin hevur á hvørjum árið borðreitt v góðum føroyskum tónleiki, og soleiðis verður aftur í ár. Erik Biskopstø ger greitt, at fleiri stórir føroyskir bólkar sleppa í ár at trína á stóra pallin á Vágsbøi.

– Vit fara at hava eitt sera spennandi føroyskt navn, sum fyri fyrstu ferð sleppur at royna seg á stóra palli, sigur Erik Biskopstø.

– Eisini fara vit at seta onkran forkunnugan eldri føroyskan bólk á pall aftur, staðfestir hann.

Komandi tíðina fara vit at fáa størri part av skránni hjá Summarfestivalinum 2011 at síggja, tá ið føroysk og útlendsk nøvn verða almannakunngjørd.



D-A-D








The Scorpions